# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Gunnar Vestergaard,** vanliga nevndur **Gunnar** í bankanum, á Tvøroyri andaðist týsdagin, 84 ára gamal.

**Louisa Udbø Jensen** andaðist týsdagin, 78 ára gomul. Kistan fer úr heiminum við Vallalíð hósdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Louisu, kunnu lata heiminum í Vallalíð eina gávu, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Bjarna Skaalum í Vági** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18 í Vágs kirkju. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Bjarna, kunnu lata Vágs kirkju eina peningagávu, konta í Suðuroyar Sparikassa.

Kistan við **Óla Christian Danielsen** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Berøa fríggjadagin kl. 14. Tey, ið ynskja at minnast Óla, kunnu lata Zarepta eina gávu - konto í peningastovnunum.

**Dagurin**
**11. juni. Barnabas**. Hann verður fleiri ferðir umtalaður í Ápostlasøguni, men so at siga altíð í sambandi við ápostulin Paulus. Var við á fyrstu trúboðanarferðini hjá ápostlinum. Evangelisturin Markus og hann vóru systkinabørn. Halgisøgan sigur, at hann á føðioynni Kýpros varð tikin av jødum og brendur á báli í árinum 62, halda teir. Í fornkirkjuni var hildið, at hann skrivaði Hebrearabrævið.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


# Millumskúlaflokkur í 1947



*F.v.: Anna Simonsen, Gulli Johanson, Elsebeth Sloan, Katrin Hansen og Tordis Mohr*

Myndir frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Myndin her er av millumskúlanæmingum í 1947.

Flokkurin er á útferð við Fjallavatn saman við Martini Holm, flokslærara.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesar myndir, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 31 og 34)

*Myndaeigarar: Katrin Samuelsen og Margit Hansen*



*F.v.: Martin Holm, flokslærari, Hervør Joensen og Sólvá Mikkelsen*

Lesið Sosialin - so eru tit við